Síðan bleiv hon au pair genta í Danmark. Hon kom aftur og arbeiðir hjá svenskum frisøri í Hull.

Andrew er næstur. Hann ætlaði at blíva lækni. Í staðin las hann farmakologi í Cardiff og London. Hetta er læran um ávirkanina av heiluvági á kropp og sinn. Hann hevur eisini doktaraheiti á hesum øki. Hann arbeiðir nú sum farmakologur á einum sjúkrahúsi í Blackburn.

Tann yngsta er Helen, sum býr í York i Norðuronglandi. Hon er útbúgvin lærari og er nú lærari í enskum fyri útlendingar.

Vit eiga 6 barnabørn, so familjan er hampiliga stór.

## Hanna: Hitti gamlan kunda í Havnarbasarinum

Undir krígnum arbeiddi eg í Havnabasarinum hjá teimum sokallaði "nissunum". Tá hitti eg nógv fólk úr Onglandi. Nú ein dagin hevði Harry tosað við ein vin hjá sær. Hann segði, at ein maður búði tætt við hjá sær, og hann segði, at hann hevði verið í Føroyum undir krígnum. Hann vildi fegin koma at heilsa uppá meg. Vit bjóðaðu honum oman og sótu og drukku kaffi. Tá sigur hann: "Eg kenni teg. Tú hevur ekspederað meg inni í Havnabasarinum". Eg mundi dottið upp eftir.

Nógvir hermenn komu inn í Havnabasarin og skuldi keypa onkur klæði til konurnar, og hetta kravdi holla ráðgeving. Eg dugdi eitt sindur av enskum, og tað batnaði eisini sum frá leið. Mær dámdi sera væl hetta arbeiðið.

Seinni varð Havnarbasarurin kendur fyri sínar lukkupakkar.



*Kristoffur Joensen var hugsjónarmaður, sum tey hjá Harry og Hannu meta sera høgt. Hetta er ikki minst galdandi fyri Louis*

Eingin visti, hvat ið var í pakkunum, so tað var spennandi at pakka upp hjá børnum.

Tað var ein norðmaður Vilhelm Andreassen, sum hevði handilin. Kona hansara var úr Suðuroy. Hann eigur ein abbason Vilhelm, sum okkara Louis kennur. Teir arbeiddu saman. Vihelm er ein góður listarmaður, hann hevur sent mær ein málning av kirkjuni í Havn. Tað var vakurt gjørt av honum. Og mær dámar hann so væl. Ein beiggi Vilhelm er Djóni. Hann eigur húsini við Landavegin 54, sum Daniel J. Danielsen, fyrrverandi trúboðari í Congo, átti. Hetta hevur eisini verið umrøtt í Miðvikuni.

Havnabasarurin var á Káta Horninum, har alt varð tikið niður fyri nøkrum árum síðani og bygt varð upp av nýggjum.

## Hava hitt kent fólk

Gjøgnum árini hava vit havt nógv samband við føroyingar bæði burtur og heima.

Tá ið vit giftist í Hollandi var ein maður frá okkara heimbýi giftur í Suðuroy. Hann var í flotanum. Báðar vígslurnar vóru lýstar samstundis í lokala blaðnum. Vit vóru eisini væl, men tey fluttu til Portsmouth sunnast í Onglandi, har tað er ein stór flotastøð. Vit hoyrdu onkuntíð frá teimum.

Í einum býi her nærindis, har systir mín livir, búði ein genta úr Havn, Ingeborg Kragesteen, sum var gift her. Vit hittu hana eisini og Hanna minnist, at tær vóru í ferðalagi til Føroyar saman við manni hennara við Tjaldrinum frá Hetlandi í 1957.

Tað hevur fleiri ferðir hent, at vit í Onglandi hava hitt fólk, sum hava kent okkum aftur frá Føroyum. Fyrstu ferð var áðrenn vit giftust og vóru á Man í feriu. Vit vóru niðri við sjóvarmálan, ein maður sigur, at hetta má vera Hanna. Hann var í Føroyum við Cameronians. Hann var ein professionellur tónleikari, hann spældi í Isle of Man dansiorkestri. Hann giftist við gentu úr Havn.

Okkara fyrsta hús var beint uttanfyri mín heimbý. Leiðarin í keypssamtøkuni á staðnum segði við Honnu ein dagin: "Eg havi eina kenslu av, at eg kenni teg frá fyrr av", og tá var hetta ein av the Cameronians, sum hevði verið í Føroyum. Hann var altíð so galantur aftaná hetta. Jú, sanniliga er verðin lítil.

Nú er tað frálíkt í Hull. Vit leigaðu fyrst eini hús, sum arbeiðsgevararnir hjá Harry útvegaðu okkum. Men eftir eitt ár fóru vit at hyggja eftir einum húsum, sum vit kundu keypa sjálvi. Vit funnu eini deilig hús, og her búgva vit enn. Vit hava góðar grannar, og beint um hornið eru handlar av øllum slag, so hetta er sera høgligt. Tað er frítt at koyra í bussi hjá pensjonistum.

## Harry: Halda føroyska flaggdagin

Eg hevði nógvar vinir millum hermenninar, og eg hitti fleiri av teimum aftaná kríggið. Vit høvdu eisini árligar samkomur fyri hermenn, sum høvdu verið í Føryum upp til 1973.

Tá byrjaðu teir at gerast gamlir, og tiltakið datt niður fyri. Men vit eru komin rættuliga nógv til gudstænastur og samkomur í donsku kirkjuni í London, har eisini nógvir føroyingar plaga at koma.

Her er eisini Louis komin, og hann kennir eisini nógvar av føroyingunum. Ein av teimum er Nicolina Prince, sum er 86 ár. Hon kom til Bretlands, áðrenn kríggið var liðugt. Hennara søga er umrødd í bókini "Kærleiki undir krígnum".

Her koma eisini nógvir føroyingar, sum eru komnir til Bretlands í seinnu árum, og tað er sera hugnaligt at hitta øll hesi.

Flaggdagin er tað fast, at føroyingar koma saman á donsku sendistovuni í London, vit vóru har i fjør og eisini í ár.



*Jákup Apol saman við konuni Poula*



*Hanna og Harry avmyndað á familjusamkomu í Miðlahúsinum í í summar*



*Andrew sonur Honnu og Harry við konu síni Meryl*

## Hanna: Kendu Sofus og Sofus

Vit kenna eisini væl Sofus Poulsen í Aberdeen. Hann arbeiddi saman við pápa í landshandlinum. Men Louis hitti hann fyrst, áðrenn eg hitti hann.

Tá Sofus hoyrdi, at hann var ein Apol, gjørdist hann eyka blíður. Sofus prátar nógv, men tað sum hann sigur er eisini vert at hoyra. Tá vit vóru til flaggdagssamkomuna í London var hann har. Hann sær tað sama út, er ikki broyttur og er altíð líka blíður. Hann hevur verið fiskimonnum og mongum øðrum sera hentur.

Vit komu eisini at kenna Sofus Olsen, sum doyði í fjør. Hann var ein serstakur persónur og hevði nógvar vinir í Bretlandi og ikki minst í Hetlandi. Hann var eisini ein góður maður fyri fiskimenn.

## Hanna: Telegrafboðið kom við deyðanum

Mamma gjørdist 62 ár og hon doyði av sjúku í 1947. Pápi gjørdist 63 ár, so tey gjørdust ikki gomul bæði. Pápi doyði so sera knappliga í 1955. Hann hevði beint verið inni á Sundi hjá Gustav og Helenu. Systir hansara við manni úr Hollandi var her uppi og ferðaðist. Pápi hevði leigað ein bát at fara inn í Kaldbaksfjørð. Veðrið var so sera gott og pápi helt, at hetta kundi verið ein góð útferð.

Tey løgdu at á Sundi at fáa sær ein drekkamunn, og pápi var beint komin í bátin aftur. Hann murrar fyri seg sjálvan, og knappliga dettur hann. Tey hildu, at hann var áhalsin, men hann bleiv liggjandi, og tá var hann deyður.

Hetta gjørdist eisini ein serligur hvøkkur fyri meg. Pápi hevði ikki verið og vitjað okkum, og nú hevði hann ætlað at koma. Hann kundi ikki siga vist nær hann kom, men hann segði við meg, at "tá ið tú sær telegrafboðið koma á